# Trivnaður og útbúgving í hásæti

**Ein avgerandi liður í arbeiðinum at nøkta tørvin á sjúkrarøktarfrøðingum er at skapa umstøður, sum starvsfólkið trívist í, og tí er ein virkin starvsfólkapolitikkur, ið setur trivnaðin í hásæti fyrsta stigið á leiðini sigur Jana Dalsgaard, forkvinna í felagnum fyri Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar, sum eisini raðfestir útbúgving og gransking sera høgt**

FORMANSVAL
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Verandi forkvinna í Felagnum fyri Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar, Jana H. Dalsgaard stillar upp aftur til formannsvalið hesuferð. Hon ásannar, at nógv av tíðini í farnu setu er farin við málum, ið alt ov leingi hava ligið á láni. Samstundis fegnast hon um, at hennara hjartamál, nýggja sjúkrarøktarfrøðingaútbúgvingin umsíðir gjørdist veruleiki og sær serliga fram til teir granskingarmøguleikar, útbúgvingin letur upp fyri.

### Støðið hækkað

Jana er sannførd um, at nýggja Bachelorútbúgvingin, er eitt tað størsta framstigið innan sjúkrarøktarfakið í Føroyum í nýggjari tíð. Ikki bara tí tað teoretiska og tað praktiska støðið hækkar á vanligu útbúgvingini, men eisini tí hon nú gevur beinleiðis atgongd til víðari lestur á kandidat- og masterstigi.

Eitt av endamálunum við nýggju útbúgvingini er eisini at binda teori og praksis saman í størri mun, enn higartil hevur verið gjørt. Eisini er tað av alstórum týdningi, at tann granskingin, ið verður gjørd, verður partur av tí praktisku sjúkrarøktini. Hetta skapar eitt umhvørvi, har sjúkrarøktarfrøðingar alsamt verða stimbraðir til at at menna sína vitan og hava eyguni opin fyri nýggjum møguleikum innan teirra fakøki.

### Tørvur á sjúkrarøktarfrøðingum

Sum øllum kunnugt, er tørvurin á sjúkrarøktarfrøðingum ovurhonds stórur. Men tey fæstu geva sær far um tær avleiðingar, hetta álvarsmál hevur fyri gerandisdagin hjá fólki. Kanningar aðrastaðni vísa, at tørvur á sjúkrarøktarfrøðingum hevur við sær størri deyðiligheit, fleiri komplikatiónir, longri innlegging umframt at starvsfólkið mistrívist alsamt.

Ein avgerandi liður í arbeiðinum at nøkta tørvin á sjúkrarøktarfrøðingum er at skapa umstøður, sum starvsfólkið trívist í. Vit sóu, hvat hendi á B6 í 2001, og slíkt má ikki henda aftur, sigur Jana. Fyrsta stigið á leiðini at forða tí er ein virkin starvsfólkapolitikkur, ið setur trivnaðin í hásætið. Við at løna fólki samsvarandi við teirra ábyrgd og útbúgving, vísa vit teimum eisini størri virðing. Her eru hendar munandi ábøtur, og tað arbeiðið heldur fram í verandi sáttmálasamráðingum, samstundis sum dentur verður lagdur á meiri frítíð og styttri arbeiðsviku.

### Samstarv

Jana ætlar at leggja nógva orku í Sygeplejernes Samarbejde i Norden, SSN.

Tað hevur ótrúliga stóran týdning at kunna læra av royndunum hjá øðrum og fáa íblástur aðrastaðni frá, sigur Jana. Samstarv við onnur lond er alneyðugt fyri allatíðina at hava fingurin á pulsinum, ikki minst í etiskum málum, har spurningarnir eru viðkvæmir og áskoðaninar ymiskar.

### Skyldur

Sjálvt um arbeiðsuppgávurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum eru broyttar, eiga vit at minnast til at tær grundleggjandi fevna um 4 ábyrgdarøki: at fremja heilsu, at fyribyrgja sjúku, at endurskapa heilsu og at linna líðingum. Jana minnir á, at sjúkrarøktarfrøðingar hava skyldu til at nýta og betra sína vitan og dygdir innan hesi 4 øki, og at ein tílík skylda eisini fevnir um gransking.



*Jana Dalsgaard, forkvinna í felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar: – Tað hevur ótrúligan stóran týdning at kunna læra av royndunum hjá øðrum og fáa íblástur aðrastaðni frá*
*Mynd Anna V. Ellingsgaard*

## Formannsval í FFS

Næsta leygardag verður aðalfundur í Felagnum fyri Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar. Nøgv stórmál eru á dagskránni, umframt at teir 836 limirnir skulu velja nýggja nevnd og forkvinnu.

# Samanhald er lyklaorðið

**Samanhald og samstarv eru alneyðug fyri at limirnir kunna økja sína tilvitan um teir fjøltáttaðu møguleikar, ið eru í yrkinum sigur Æna Reinert, deildarleiðari á psykiatriska ambulatorinum, ið er annað valevni til formansvalið í felagnum fyri Føroyaskar Sjúkrarøktarfrøðingar**

FORMANSVAL
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Æna Reinert, deildarleiðari á psykiatriska ambulatorinum, er annað valevni til formansvalið í í FFS. Hon hevur verið nevndarlimur í felagnum í 12 ár.

Æna vísir á, at stóra limatalið í felagnum krevur, at limirnir leggja seg eftir at vera meir sjónligir fyri hvør øðrum. Yrkisøkið er breitt, og tí er samanhald lyklaorðið, um allir limirnir skulu kenna seg væl, sigur hon. Samanhald og samstarv eru eisini alneyðug, fyri at limirnir kunna økja sína tilvitan um teir fjøltáttaðu møguleikar, ið eru í yrkinum.

### Felags tulkingar

Æna metir, at hon nokk er tann limurin í felagnum, ið hevur hollast royndir, tá tað ræður um sáttmálasamráðingar. Samráðingarnar hava fylt nógv í farnu setu og gera tað framvegis. Æna bjóðar seg nú fram at leiða hetta arbeiðið í eini áhaldandi roynd at betra um lønar- og setanarviðurskiftini hjá øllum sjúkrarøktarfrøðingum.

Sáttmálin er ofta ógvuliga torskildur, sigur hon. Hetta viðførur nógvar misskiljingar og ymiskar tulkingar til tær einstøku greinarnar. Æna hevur sett sær fyri at arbeiða fram ímóti, at felagið saman við Fíggjarmálaráðnum fær felags tulkingar til allar ivaspurningar.

### Samstarv og útbúgving

Æna hevur umboðað FFS í Sygeplejernes samarbejde i Norden, SSN, síðani felagið gjørdist limur í 1998. Hon hevur verið tann føroyski limurin, sum hevur verið við til at tilrættaleggja árligu fagpolitisku rástevnurnar hjá Norðurlendska samstarvinum. Í yrkisblaðnum Vøka er fyrilestur hjá Ænu í SSN endurprentaður, har hon vísir á fleiri skeivar gongdir innan føroyska felagið, sammett við hini Norðurlondini.

Hon fegnast eisini um nýggju Bachelorútbúgvingina í sjúkrarøktarfrøði, men minnir á, at nýggja útbúgvingin krevur í enn størri mun, at sjúkrarøktarfrøðingar við eldri útbúgvingum fáa høvi og møguleika at eftirútbúgva seg.

### Starvsfólkapolitikkur

Æna vísir á, at eitt er at orða ein starvsfólkapolitikk, annað er at fremja hann í verki. Veruleikin er, at á flestu arbeiðsplássum hjá sjukrarøktarfrøðingum er starvsfólkapolitikkurin als ikki settur í verk. Tað einasta, ið er lagt fast, eru setunarsamrøðurnar, ongar starvsfólkasamrøður eru og heldur ongin eldrapolitikkur er á arbeiðsplássunum. Hetta undrar Ænu, tí miðalaldurin á føroyskum sjúkrarøktarfrøðingum er tann hægsti í Norðurlondum.

Tað merkja vit longu nú, og spurningurin um, hvussu vit skulu ganga ynskjunum hjá eldri sjúkrarøktarfrøðingum um niðursetta tíð á møti, gerst alsamt meir bráðfeingis.

Tað kann ikki vera meiningin, at hesin bólkur innan okkara yrki skal taka til takka við lappaloysnum. Her má ein heildarætlan orðast og setast í verk. Ongantíð ov skjótt, sigur Æna Reinert.



*Æna Reinert, deildarleiðari á psykiatriska ambulatorinum: - Vit mugu betra um lønar- og setanarviðurskiftini hjá øllum sjúkrarøktarfrøðingum*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Pól Hentze í Smiðjuni

**Hósdagin 18. mars letur Pól Hentze í Havn upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík**

Á framsýningini er 12 oljumálningar við føroyska landslagnum sum myndaevni.

Pól sigur, at hann sum ein trúgvandi maður er serliga hugtikin av Guds skaparverki, og vónar hann, at tað sæst aftur í málningunum.

Hann fær íblástur úr náttúruni og frá næmingunum á skúlanum, bæði tað sum teir gera og t.d. teirra andlitsbrá. Honum hevur altíð dámt sera væl at tekna, og hevur hann havt framsýningar á fleiri bygdastevnum í Sandoynni. Í fjør hevði hann eisini framsýning í Smiðjuni. Honum dámar eisini væl tónleik og spælir nógv gittar.

Pól er 47 ára gamal og ættaður úr Skopun. Hann tók lærarapróg v á Føroya Læraraskúla í 1984 og hevur verið lærari við Sandoyar Meginskúla og í skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík. Hann hevur eisini verið lærari á Skála og í Ørebro í Svøríki. Síðan 1998 hevur hann búð í Havn og verið lærari í Hoyvíkar Skúla.

Hann er giftur við Bjørgu, f. Mortensen, úr Havn, og tey eiga tríggjar døtur.

Framsýningin letur upp hósdagin 18. mars og er opin til og við mikudagin 24. mars, allar dagar frá kl. 16.00 – 20.00



*Mynd: Álvur Haraldsen*

Signhild Wolles, D.B. Bilar:

# Ger høvuðsuppgávu um marknaðarføring av akkumulatorum

Sum liður í útbúgving síni sum goymslukvinna innan bilbranchuna ger 21 ára gamla Signhild Wolles úr Havn, sum er í læru á eykalutagoymsluni hjá D.B. Bilum, longu nú høvuðsuppgávuna, sum hon skal verja á Mommark Handelskostskole í august. Lærutíðin er úti í desember 2004.

Signhild Wolles fór í læru hjá D.B. Bilum, sum goymslukvinna innan bilbranchuna, 3. desember 2001. Lærutíðin er tilsamans trý ár. Hesa tíðina skal hon tríggjar ferðir í tvær vikur á Mommark Handelskostskole í Suðurjútlandi, nærhendis Sønderborg, har hon umframt vanliga skúlan eisini hevur nakrar vallærugreinar sum t.d. logostik og spacemanegment.

Endaliga prόvtøkan verður í august. Uppgávan hjá Signhild gongur út upp á, at hon skal gera eina ritgerð um marknaðarføring av eysturríksku Banner akkumulatorum, sum tey umboða.

Banner fyritøkan byrjaði í 1937, og er hon millum tríggjar teir størstu akkumulatorframleiðararnar í heiminum. Millum annað vóru Banner teir fyrstu, ið gjørdu turrbattaríir. Har umframt framleiða teir eisini universalbattaríir við fýra polum, sum ger tað møguligt við einans 5 battarímodellum, at nøkta tørvin til heili 900 ymisk bilsløg. Við hesum nýskapandi akkumolatorsniði spara vit goymslupláss, men vit kunnu framvegis útvega viðskiftisfólki okkara tað bestu hjálpina, sigur Signhild.

Lærumeistari hennara er Carsten Ottosen hjá D.B. Bilum.

Signhild er dóttir Elsu og Karl Wolles í Havn.



*Signhild Wolles á goymsluni hjá D.B. Bilum. Hon ger eina ritgerð um marknaðarføring av Banner akkumulatorum sum høvuðsuppgávu*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dagurin

**18. mars. Aleksander**, deyður umleið ár 250. Úr Alexandriu og endaði sum biskupur í Jerusalem. Fleiri ferðir varð hann atsøktur fyri trúgv sína, men komst undan og doyði ein natúrligan deyða, varð *blóðvitni uttan blóð*, sum tikið verður til.

## Til minnis um vin mín
# Edvin Strøm



Góði Edvin.

Tað kom mær dátt við fríggjamorgunin at frætta, at tú var farin um sýnina, har ikki vendist aftur, at okkara prát á kaiini fyri stuttum, har tú fortaldi mær, at tú skuldi til Danmarkar at leggjast undir skurð, skuldi blíva okkara seinasta, hevði eg ikki væntað.

Eg spurdi teg tá, um tú var bangin fyri hesi álvarsomu støðu, sum lá fyri framman, men tú svaraði líka knappur sum altíð: »Bangin, bangin fyri hvørjum, je eg eri ikki bangin, men hopi at tað fer at ganga gott«.

Tað gekk ikki, sum vit vónaðu og ynsktu fyri teg góði vinur, men tú hevur fingið frið og er komin heim til tann æviga staðin, har einans er gleði og sorgin ei finst.

Títt hjarta sló fyri tínum kæru og fyri tíni heimbygd, og minnist eg, hvussu glaður tú altíð var og erpin, tá tú fortaldi um, hvussu ríkur tú var – ikki í pengum, men at tú hevði so nógv at takkað fyri – tína konu, børn og abbabørn, sum tú var so sera góður við og sum høvdu alt at siga fyri teg – tú vardi um og tók tær væl av tínum lítla kongaríki.

Heimbygdin Vág og hennara vælferð lá tær nær, og var tú altíð sera áhugaður í øllum, sum gekk fyri seg á kaiini og nærumhvørvinum, tí tú vildi bygdini alt tað besta, og tú segði mangan við meg, at gekk tað skipum og virkjum væl, so gekk tað eisini bygdini og fólkinum væl, og tað var umráðandi fyri teg at síggja bygdina blóma, meðan tað eisini píndi teg, tá tú sá tað gekk ímóti.

Tú var bersagdur, segði tingini sum tey vóru, ja rætt og slætt kallaði ein spaka fyri ein spaka, og tað sóu eg og mong við mær stórt virði í, tú var erligur sum fáur, ein visti altíð hvar ein hevði teg.

Vit øll, sum kendu teg, eru vorðin fátækari, nú tú ikki er millum okkum longur, Vágsbygd er vorðin fátækari uttan teg, men minnini kann ongin taka frá okkum.

Eg eri glaður fyri at hava kent teg, góði Edvin, og saknurin verður stórur ikki at fáa teg á vitjan og fáa eitt hugnaligt lívligt prát yvir ein kaffimun við teg aftur – tað var nakað serligt.

Hóast aldurmunurin var stórur okkara millum, so var bylgjulongdin okkara millum í lagi, og sinn og hugburður tín vóru ung.

Tykkum, sum hava mist ein góðan mann, pápa, verpápa og abba, ynski eg, at Harrin má styrkja og styðja í stóru sorg tykkara.

*Tá síðsti stormur er riðin av,*
*á ljósu strondum eg lendi,*
*tá skal eg skoða, hvat Harrin gav*
*til tey sum aftur ei vendu;*
*ei nakar hugi tað skilja kundi,*
*ei nakað eyga tað síggja mundi,*
*hvat har hann hevur teim goymt*

*Lat akker falla! Eg náddi havn,*
*farvæl tú ótrygga bylgja!*
*Eg leggi meg í hans kærleiksfavn,*
*sum trúgvur mær vildi fylgja.*
*Hoyr, kendar røddir meg blíðar*
*kalla,*
*nú stilt mítt akker man niður falla*
*í tryggu, sælu hvíldarhavn.*

Við hesum fátøku orðum lýsi eg frið yvir vin mín, Edvin Størm.

**Johan Dahl**

# Tøkk

Fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Maria Hermansen**
Leynum

doyði og varð jarðað, vilja vit takka.
Prestunum Ingu Poulsen Dam og Hera Joensen.
Sangarum, berarum, kirkjutænarum, gravarum
og øllum, ið hjálptu til við ervinum.
Somuleiðis heimarøktarum, ið vóru um hana
ta tíðina hon var óhjálpin.
Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk tit, ið fylgdu
henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Hjartans tøkk øll somul.

**Børnini**